## Bloomberg afturvaldur

Michael Bloomberg varð í gjár afturvaldur til borgarstjóra í New York. Men sigurin gjørdist munandi meiri tepur, enn tey flestu høvdu væntað. Tá uppteljingin var liðug, hevði Bloomberg fingið 50 prosent av atkvøðunum. Demokratiski avbjóðarin, Bill Thompson, fekk 46 prosent. Fjølmiðlarnir halda, at ríkmaðurin Bloomberg brúkti einar 100 milliónir dollarar ella umleið 500 milliónir krónur fyri at endurvinna borgarstjórasessin. Michael Bloomber, sum er 67 ára gamal, fær rós fyri at hava gjørt New York til ein tryggari bý at búgva í, tí harðskapurin er nógv minkaður tey seinastu árini.



## Skutu fiskimenn

Í Somalia vilja tey vera við, at tveir sakleysir fiskimenn doyðu, tá norskir hermenn skutu eftir báti teirra úti fyri somalisku strondini seinasta vikuskifti. Ein talsmaður fyri fólkið í bygdini Caluula sigur við tíðindastovuna AP, at menninir, sum norsku hermenninir skutu, vóru fiskimenn og ikki sjórænarar. Hann leggur afturat, at annar maðurin var úr bygdini, men at hin var komin úr Jemen. AP skrivar, at upplýsingarnar hjá byugdarfólkinum samsvara við tað, sum somaliskir myndugleikar hava sagt. Norska verjan sigur, at norðmenninir skutu, tí tað bleiv skotið eftir teimum, men tað avsanna somalisku keldurnar.

# Kári spyr Jóhan um fiskimenn og ALS



- Grundreglan má vera, at tey, sum tryggja seg við at gjalda inn í eina skipan, mugu javnbjóðis við onnur eiga rættindi til útgjald, tá inntøkan svíkur, heldur Kári P. Højgaard

Mynd: Karstin Vang

**Kári P. Højgaard, løgtingsmaður Sjálvsstýrisfloksins, hevur í dag sett Jóhan Dahl, landsstýrismanni, munnligan fyrispurning um viðurskiftini hjá sjófólki í Arbeiðsloysisskipanini**

ALS
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Løgtingsmaðurin spyr, um landsstýrismaðurin kennir nakað til trupulleikan, at sjófólk, sum missa inntøku í longri tíð, framvegis hava trupulleikar við at fáa pening útgoldnan úr ALS.

Kári P. Højgaard spyr, um sjófólk hava fingið neyva kunning um, hvørji rættindi tey hava til útgjald úr ALS eftir broyttu reglunum.

Hann spyr eisini, um karantenan á 30 dagar er galdandi hvørja ferð, sjálvt um skip hevur afturvendandi maskintrupulleikar sum gera, at manningin onga inntøku hevur helmingin av tíðini.

At enda spyr Kári P. Højgaard, um politiska skipanin hevur viðgjørt hugskotið, um sjófólk kanska skuldu havt sína egnu skipan.

### Grundreglan

Løgtingsmaðurin vísir í sínum viðmerkingum á, at tað hevur verið eitt drúgt stríð at vinna fiskimonnum rættindi og møguleikan fyri at fáa útgjald úr Arbeiðsloysisskipanini fyri mista inntøku, tá skipið, teir eru knýttir at, hevur verið til umvælingar.

- Grundreglan má vera, at tey, sum tryggja seg við at gjalda inn í eina skipan, mugu javnbjóðis við onnur eiga rættindi til útgjald, tá inntøkan svíkur, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður í viðmerkingum sínum til fyrispurningin.

Jóhan Dahl fer at svara fyrispurninginum hjá løgtingsmanni Sjálvstýrisfloksins í dag.



*Væntandi landa partrolararnir Rókur og Lerkur í Saltangará í morgin ella fríggjadagin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Rókur og Lerkur verða teir næstu

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hesa vikuna hava fáar landingar verið á landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará.

Mánadagin vóru partrolararnir Jaspis og Ametyst inni við umleið 240.000 pundum av upsa, og gongst sum ætlað, koma partrolararnir Rókur og Lerkur inn at landa í morgin ella fríggjadagin.

Túrarnir hjá partrolarunum eru heldur longri enn vanligt í løtuni, og tað merkir, at upsaveiðan ikki roynist nakað serligt.

Á landingarmiðstøðini hjá Beta siga tey, at Rókur og Lerkur vóru reiðiliga hálvfullir fyrr í hesi vikuni, og tí er væntandi, at hetta kortini verður ein hampiligur túrur hjá skipunum, tá tey koma inn at landa - í morgin ella fríggjadagin.

# Garnaskip við havtasku

**Línuskipið Havbúgvin landaði í Sørvági mánadagin, og í dag landa garnaskipini Drelnes og Nim**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Havbúgvin, sum landaði í Sørvági mánadagin, hevur gjørt ein góðan túr undir Føroyum. Teir hava roynt vestanfyri og hava havt góðan fiskiskap. Veiðan var umleið 100.000 pund, harav eini 70.000 pund var toskur.

Havbúgvin, sum er fyrrverandi Núpur, byrjaði túrin fyri lítlari viku síðan.

Í dag landa tvey garnaskip í Sørvági. Tað eru Drelnes og Nim, sum báðir eru heimahoyrandi á Tvøroyri.

Á landingarmiðstøðini í Sørvági vænta tey, at Drelnes hevur eini 20.000 pund og Nim eini 10.000 pund.

Bæði skipini eru á havtaskuveiði við gørnum.




*Nim (mynd) hevur eini 10.000 pund og Drelnes 20.000 pund*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*